# NÁMSSKIPAN

## ÚTBÚGVING TIL SJÚKRARØKTARFRØÐING

Fróðskaparsetur Føroya
Sjúkrarøktarfrøðideildin
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn
Føroyar
TLF. 352250
TELDUPOSTUR: SFD@setur.fo
Heimasíða: www.setur.fo

Innihaldsyvirlit

1.0 Inngangur ..... 1
2.0 Endamálið við útbúgvingini ..... 1
3.0 Læruúrtøka ..... 3
4.0 Vitanargrundarlag og hættir í sjúkrarøktini ..... 4
5.0 Læru- og undirvísingarhættir ..... 4
6.0 Skipan av kliniskari undirvísing ..... 4
7.0 Lestrarskipan ..... 7
8.0 Eindarlýsingar ..... 8
9.0 Valfríur partur ..... 8
10.0 Tvørfakligur partur ..... 8
11.0 Altjóðagerð ..... 8
12.0 Yvirlit yvir býtið av ECTS í útbúgvingini ..... 9
13.0 Yvirlit yvir próvtøkur ..... 10
14.0 Próvdøming ..... 12
15.0 Góðskriving ..... 14
16.0 Luttøka í klinisku undirvísingini ..... 14
17.0 Góðkenning av kliniskum útbúgvingarstøðum ..... 14
18.0 Faklýsingar ..... 15

## 1.0 Inngangur
Námsskipanin fyri útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing á bachelorstigi er gjørd sambært:

Løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum
Kunngerð nr. 19 frá 3. mars 2011 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum (B.Sc.Cur.)
Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya
Løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012 um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya.

Útbúgvingin er ásett at vera 4 studentsársverk, sum svarar til 240 ECTS[1] og er býtt í 16 eindir.
Útbúgvingin er sett saman av einum ástøðiligum parti, sum er 150 ECTS, og einum kliniskum parti, sum er 90 ECTS. Ein eind kann vera ástøðilig ella klinisk ella samansett av báðum.
Útbúgvingin gevur rætt til heitið **Bachelor í sjúkrarøktarfrøði.** Latínska heitið er baccalaureus scientarium curationes, stytt B.Sc.Cur. Enska heitið er Bachelor of Science (BSc) in Nursing.
Eftir lokið prógv hevur lesandi rætt til løggilding sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Kunngerð nr. 19 frá 3. mars 2011 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum (B.Sc.Cur), Kap 1, §1 og 2

## 2.0 Endamálið við útbúgvingini
Endamálið við útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing er at geva lesandi førleika til eftir lokna útbúgving at kunna virka sjálvstøðugt sum sjúkrarøktarfrøðingur og vera við í fakligum og tvørfakligum samarbeiði. Útbúgvingin skal, í samsvari við ta samfelagsligu, vísindaligu og tøkniligu menningina og tørvin á sjúkrarøkt, geva teimum lesandi førleika í ástøðiligum og kliniskum sjúkrarøktarkunnskapi.

Løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum, Kap 1,§ 2

Hetta merkir, at lesandi skal kunna:

- útinna, miðla og leiða sjúkrarøkt, sum er heilsufremjandi, heilsuvarðveitandi og fyribyrgjandi eins væl og viðgerandi, endurmennandi og linnandi.
- fáa ein vandnan og greinandi førleika fyri at kunna meta um, grundgeva og menna sítt yrki til frama fyri sjúklingin og samfelagið.
- samstarva við sjúklingin, avvarðandi, starvsfelagar og aðrar yrkisbólkar uttan mun til etniska, mentanarliga, átrúnaðarliga og málsliga bakgrund.
- menna sjúkrarøkt, endurnýggja og brúka kenda vitan í nýggjum samanhangi og harumframt fylgja við í, gera nýtslu av og taka lut í granskingararbeiði á heilsuøkinum.
- halda fram í ástøðiligum og kliniskum førleikagevandi framhaldslestri eftir lokna útbúgving.

[1] ECTS: European Credit Transfer and Accumulation System

## 2.1 Almennir førleikar
Eftir lokna útbúgving hevur sjúkrarøktarfrøðingurin hesar almennu førleikar:

**Akademiskt arbeiðslag**: arbeiða kannandi og fyrihalda seg kritiskt og greinandi til spurdómar. Herundir eisini orða, lýsa, greina og tulka fakligar spurdómar og seta fram niðurstøður og perspektivering.

**Málsligir førleikar**: orða seg nágreiniliga, bæði munnliga og skrivliga.

**Samskiftis førleikar**: samskifta og samstarva við menniskju.

**Sjálvstøðugt arbeiðslag**: arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í toymum.

**Trupulleikaloysing**: førleika til at staðfesta og loysa trupulleikar.

**Vitan í praksis**: førleika at nýta vitan í verki.

**Menning**: førleika til at menna og dagføra egnu læring.

## 2.2 Fakligir førleikar
Eftir lokna útbúgving hevur sjúkrarøktarfrøðingurin hesar fakligu førleikar:

**Yrkisgrundarlag**
Dugir at útinna sjúkrarøkt við atliti at lógum og etiskari umhugsan, ið eru grundarlag undir yrkinum.

**Samskiftisevnir**
Dugir at samskifta og skapa terapeutiskt samband við sjúkling og avvarðandi, við atliti at teirra tørvum og fortreytum.

**Sjálvstøðugar avgerðir**
Er førur fyri at taka vælgrundaðar avgerðir viðv. sjúklinginum, sum taka hædd fyri likamligum, sosialum, sálarligum, mentanarligum, andaligum og umhvørvisligum faktorum.

**Leiða og samstarva**
Førur fyri at arbeiða við einstaklingum og toymum fyri at fremja og útinna dygdargóða sjúkrarøkt til hvønn einstakan.
Førur fyri at fyrisita og samskipa sjúkrarøktina og viðgerðina hjá einum ella fleiri sjúklingum.

Førur fyri at leiða eitt toymi av samstarvsfeløgum, lesandi og næmingum, sum beinleiðis eru við í sjúkrarøktini.

**Menna**
Førur fyri at reflektera kritiskt um praksis og taka stig til at dagføra sjúkrarøktina í mun til nýggja sannkenning.
Førur fyri at taka lut í menningar- og granskingarverkætlanum innan sjúkrarøkt.

**3.0 Læruúrtøka**
Eftir lokna útbúgving skal tann lesandi:

- greiða frá fakinum og virkisøkinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum.
- miðla sjúkrarøktarvitan til sjúklingar, avvarðandi, starvsfelagar, samstarvspartar, borgarar, sjúkrarøktarfrøðilesandi og næmingar innan almanna- og heilsuverkið.
- undirvísa og vegleiða sjúklingum, avvarðandi, starvsfeløgum og samstarvspørtum, við atliti at teirra fortreytum.
- stuðla sjúklingum, familjum og bólkum at meta um og brúka teirra likamligu, sálarligu, sosialu og andaligu møguleikar í tí umhvørvi tey liva og virka í.
- leita fram og brúka nýggjastu vitan at útinna sjúkrarøkt, sum fremur og varðveitir heilsu og fyribyrgir sjúku í samsvari við tjóðar og altjóða krøv.
- savna, greina og meta dátur í mun til at geva sjúkrarøkt til tann einstaka.
- taka lut í fakligum og tvørfakligum samstarvi í mun til heilsu, sjúku og endurmenning
- duga at samskifta við sjúkling, avvarðandi og samstarvspartar grundað á samskiftisástøði.
- duga at brúka ástøði í mun til at meta, leggja til rættis, útinna og eftirmeta fyri at kunna geva eina trygga, evidensgrundaða sjúkrarøkt.
- duga at meta um og útinna sjúkrarøkt, sum fatar um tað likamliga, sálarliga, sosiala og andaliga í lívinum og tann hátt tey ávirka heilsu, sjúku, avlamni og líðing.
- duga at útinna sjúkrarøkt, bæði sjálvstøðugt og sum limur í fakligum og tvørfakligum arbeiðsbólki.
- duga at stuðla sjúklingum, familjum, bólkum og nærsamfelagnum at vera virkin sjálvi.
- duga at útinna fakligu leiðsluna av sjúkrarøkt til hvønn einstakan  sjúkling og sjúklingabólkar.
- duga at skjalfesta sjúkrarøktina.
- duga at menna tiltøk, ið fremja og varðveita heilsu og fyribyrgja sjúku.

**4.0 Vitanargrundarlag og hættir í sjúkrarøktini**
Vitanargrundarlagið fyri sjúkrarøktarvirksemi til sjúklingar og borgarar fatar um m.a.: Praksis-, menningar- og granskingargrundað vitan um sjúkrarøkt, íroknað curologi og patientologi, umframt hugtøk, ástøði, skipaða grundan, hættir, háttaløg og frymlar til frágreiðing, fatan, refleksjón, grundgeving og virkni.

**Meginháttaløg í sjúkrarøkt fata um**:

- Klinisk háttaløg í mun til observasjón, meting, at taka avgerðir, intervensjón, skjalfesting og eftirmeting í mun til sjúkrarøkt.
- Refleksjónhættir til skipaða grundan í mun til grundgivið, vitanargrundað sjúklinga- og borgararættað sjúkrarøktarvirksemi.
- Granskingarháttaløg til menning av vísindaliga-, evidens- og intervensjónsgrundalagnum í sjúkrarøktini.

**5.0 Læru- og undirvísingarhættir**
Útbúgvingin er skipað fakliga og námsfrøðiliga, soleiðis at lesandi mennir vitan, hegni og førleika at viðgera sjúkrarøktarfakligar spurdómar.
Lestrarhættirnir vera tillagaðir tí samanhangi, sum undirvísingin fer fram í, fyri at geva lesandi møguleika at menna fakligar, persónligar og grundleggjandi akademiskar førleikar. Kannandi lesnaður verður brúktur í allari útbúgvingini, har lesandi aktivt arbeiðir við spurdómum knýttir at ymisku evnunum – einstaklinga ella í bólkum.
Læru- og undirvísingarhættir, ið verða brúktir eru m.a. PBL, case, sjálvlestur, dialogundirvísing, verkætlanararbeiði, bólkaarbeiði, lesibólkar, lestrarspurningar og fyrilestrar. Harumframt venja lesandi hegni í venjingarstovuni.

Skjalaskjátta verður brúkt sum amboð at skipa samanhang millum ástøðiliga og kliniska útbúgvingarpartin.

**6.0 Skipan av kliniskari undirvísing**
Kliniska undirvísingin skal fremja fakeyðkendar, persónligar og grundleggjandi akademiskar førleikar, soleiðis, at samlaða læruúrtøkan í útbúgvingini verður rokkin.
Skilt verður millum hegnisvenjing, sum fer fram í venjingarstovu og kliniska undirvísing, sum fer fram í góðkendum kliniskum útbúgvingarstøðum.

**Hegnisvenjing í venjingarstovu.**
Hegni er persónligur kunnskapur, sum hvør einstakur venur við praktiskari venjing.
Venjingarstovan er ein eftirgjørd deild við somu amboðum, sum finnast á klinisku útbúgvingarstøðunum.
Undirvísingin er grundað á granskingar- og menningar arbeiði. Hegnisvenjingin hevur sjúklingin sum útgangsstøði. Lesandi skal reflektera um egið avrik.

**Klinisk undirvísing í góðkendum kliniskum útbúgvingarstøðum.**
Undirvísingin verður skipað sum *sjúklingagongd og temagongd* – til skiftis ella møguliga samstundis.

**Sjúklingagongd**
Endamálið við *sjúklingagongd* er at lesandi fær yvirlit yvir støðuna hjá sjúklinginum. Samstundis gevur sjúklingagongd møguleika fyri, at lesandi fær økta ábyrgd fyri røktini, at síggja úrslit av egnum metingum og gerðum og fær grundarlag at laga røktina til um neyðugt. Lesandi átekur sær sjúkrarøktaruppgávur í samsvari við útbúgvingarstøðið.
*Sjúklingagongdir* kunnu fara tvørtur um deildir og serøki.
Lesandi endar eina *sjúklingagongd* við at gera munnliga ella skrivliga eftirmeting av úrsliti og tilgongd. Úrslitið skal metast eftir, hvussu málið í røktini er rokkið. Tilgongdin snýr seg um samstarvið við sjúklingin og metingina av arbeiðshættum og gerðum.

**Temagongd**
Endamálið við *temagongd* er at lesandi mennir førleikan fyri *miðvíst og skipað* at kanna spurdómar innan ávísa sjúkrarøkt í kliniskum høpi og soleiðis at økja sítt fakliga innlit innan sjúkrarøkt. Temagongdin gevur samstundis lesandi møguleika fyri at menna tilvitskuna um granskingarháttaløg og førleikan at argumentera skrivliga og munnliga.
Lesandi ger skrivliga ætlan viðvíkjandi endamáli, kanningarøki, arbeiðshátti og tíðarætlan.
*Temagongdin* endar við, at lesandi skrivliga eftirmetir úrslitið og tilgongdina.

*Sjúklingagongd og temagongd* kunnu stuðlast av t.d. evnilestrum og ráðstevnum, har viðkomandi sjúklinga- ella temagongd eru til viðgerðar.
*Temagongd* kann leggjast til rættis í mun til observerandi[2], samvirkandi[3] og yrkisbeindan lesnað[4].
*Sjúklingagongd* kann leggjast til rættis í mun til samvirkandi og yrkisbeindan lesnað.
Avgerðin um hvørjar og hvussu nógvar sjúklingar lesandi skal hava, og hvussu sjálvstøðugt lesandi skal arbeiða við *sjúklingagongd*, verður tikin í mun til viðkomandi

---

[2] *Observerandi lesnaður er:* at lesandi er saman við sjukrarøktarfrøðingi og observerar og útinnir avmarkaða sjúkrarøkt. Lesandi fær møguleika at observera, lýsa og greina sjúkrarøktarfakligar spurdómar í praksis. Hesin lesnaður verður skipaður í sambandi við evni og tema frá ástøðiligu undirvísingini.

[3] *Samvirkandi lesnaður er:* at lesandi luttekur í og útinnir sjúkrarøkt saman við sjúkrarøktarfrøðingi. Lesandi fær møguleika at observera, lýsa og greina sjúkrarøktarfakligar spurdómar og útinna sjúkrarøkt til útvaldar sjúklingar.

[4] *Yrkisbeindur lesnaður er*: at lesandi sjálvstøðugt ávikavist leggur til rættis, útinnir, eftirmetir og mennir sjúkrarøkt við sjúkrarøktarfrøðingi sum vegleiðara. Lesandi hevur møguleika at útinna, leiða, miðla og menna sjúkrarøkt, íroknað at samstarva við sjúklingin og fylgja við honum ígjøgnum røktar- og viðgerðargongdina.

førleikar hjá lesandi, hvat evni dentur verður lagdur á, og hvussu samansettar sjúkrarøktaruppgávurnar eru.

## 7.0 Lestrarskipan

| februar - apríl<br>Vika 5 – 14 | apríl – juni<br>Vika 16 - 25 | Summarfrí<br>juli – august<br>Vika 26 - 33 | september - november<br>Vika 34 - 43 | november – januar<br>Vika 45 - 3 |
|---|---|---|---|---|
| | | | **Eind 1 15 Á** | **Eind 2 14Á + 1K** |
| | | | Mannakroppur | Grundleggjandi tørvir |
| **Eind 3 13Á + 2K** | **Eind 4 9Á + 6K** | | **Eind 5 15K** | **Eind 6 14Á + 1K** |
| Sjúkrarøkt til fólk við somatiskari sjúku (A) | Sjúkrarøkt til fólk við somatiskari sjúku (B) | | Sjúkrarøkt til fólk við somatiskari sjúku (Klinikk) | Sjúkrarøkt til børn og familju |
| **Eind 7 7Á + 8K** | **Eind 8 3Á+12K** | | **Eind 9 12Á + 3K** | **Eind 10 12Á + 3K** |
| Sjúkrarøkt til eldri.<br>Sjúkrarøkt til varandi sjúk. (A)<br>Endurmenning. | Sjúkrarøkt til eldri.<br>Sjúkrarøkt til varandi sjúk. (B)<br>Endurmenning. | | Heilsufremjandi og fyribyrgjandi sjúkrarøkt í samfelagsligum høpi | Sjúkrarøkt til bráð- og álvarsliga sjúk.<br>Alternativ røkt og viðgerð.<br>Linnandi sjúkrarøkt. |
| **Eind 11 15 Á** | **Eind 12 3Á + 12K** | | **Eind 13 6 Á + 9 K** | **Eind 14 15 K** |
| Menning og góðskutrygging.<br><br>Valfrítt evni í sjúkrarøkt – verkætlan. | Sjúkrarøkt til menniskju við sálarligum sjúkum | | Relatiónin millum sjúkrarøktarfrøðing og sjúkling í stutta møtinum | Sjúkrarøkt og sjálvstøðug yrkisútinnan og leiðsla |
| **Eind 15 7Á + 3K** | **Eind 16 20Á** | | | |
| Valfrí eind<br>Evni/øki í mun til ritgerðarevni | Bachelorritgerð | | | |

Útbúgvingin er skipað í 16 eindir. Eind 1 – 14 eru 15 ECTS. Eind 15 er 10 ECTS og Eind 16 er 20 ECTS.
Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Summarfrí er í juli og august. Broytingar kunnu koma fyri orsakað av fastløgdum feriudøgum. Lesandi verða kunnað, áðrenn lestrarárið byrjar.

1 vika er 1,5 ECTS. Arbeiðsbyrðan hjá lesandi er roknað at vera í minsta lagi 40 tímar um vikuna.

**8.0 Eindarlýsingar**
Hvør eind er lýst í eini eindarlýsing. Eindarlýsingin er ein neyv lýsing av endamáli, ECTS býti, fakbýti , innihaldi, læru- og undirvísingarhættum, læruúrtøku og próvdøming. Eindarlýsingarnar eru dagførdar árliga, soleiðis at tær fylgja nýggjastu vitan á økinum. Eindarlýsingarnar skulu útflýggjast lesandi í seinasta lagi fyrsta dag í ávísu eindini. Við eindarbyrjan verður eindarlýsingin gjøgnumgingin.

**9.0 Valfríur partur**
Eind 15 er valfríur partur, sum er 10 ECTS-námsstig. Valfríi parturin kann innihalda ástøðiligar, kliniskar og tvørfakligar gongdir antin á Sjúkrarøktarfrøðideildini ella á øðrum ástøðiligum ella kliniskum útbúgvingarstøðum innan- og uttanlands. Tað er krav, at evnið ella økið hevur tilknýti til ritgerðarevni.

**10.0 Tvørfakligur partur**
Í útbúgvingini er møguleiki fyri at taka tvørfakligar ella tvøryrkisligar partar innan bæði ta ástøðiligu og kliniska undirvísingina. Undirvísingin kann leggjast til rættis í samstarvi við í minsta lagi ein av teimum samstarvspørtum, sum eru viðkomandi fyri yrkisbólkin.

**11.0 Altjóðagerð**
Møguleiki er at vera á góðkendum útbúgvingarstøðum í útlondum. Hettar er galdandi fyri bæði ástøðiliga og kliniska útbúgvingarpartin við teirri treyt, at tíðarskeiðið kann javnvirðast við krøvini á Sjúkrarøktarfrøðideildini fyri sama skeið.
Grundað umsókn um lestur uttanlands skal latast Sjúkrarøktarfrøðideildini. Avtala við annað útbúgvingarstað um lesnað er bindandi. Sjúkrarøktarfrøðideildin metir í hvørjum einstøkum føri, um umsóknin verður gingin á møti.
Sjúkrarøktarfrøðideildin kann gera undantak, um so er, at serlig viðurskifti gera seg galdandi.
Bachelorritgerðin kann ikki verða vard í útlondum.

## 12.0 Yvirlit yvir býtið av ECTS í útbúgvingini

| Eind | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **Í alt** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Fak* | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| *Sjúkrarøktarfakið* | | | | | | | | | | | | | | | | | **140** |
| Ástøðilig undirvísing | 2.0 | 9,0 | 2,0 | 1.0 | | 3,5 | 1,5 | 1,0 | 2,5 | 3,0 | 7,0 | 0,5 | 1,5 | | 4,5 | 11,0 | 50 |
| Klinisk undirvísing | 0,0 | 1,0 | 2,0 | 6,0 | 15,0 | 1,0 | 8,0 | 12.0 | 3,0 | 3,0 | | 12,0 | 9,0 | 15,0 | 3,0 | | 90 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| *Heilsu- og náttúruvísindalig fak* | | | | | | | | | | | | | | | | | **65** |
| Sjúkulæra | | | 3,0 | 4,0 | | 1,0 | 0,5 | | 0,5 | 1,5 | 1,0 | 0,5 | | | | 1.0 | 13,0 |
| Farsóttar-/umhvørvislívfrøði | | | | | | | | | 1,5 | | | | | | | | 1,5 |
| Fólkaheilsuvísindi | | | | | | 1,0 | | | 2,0 | | | | | | | 1,5 | 4,5 |
| Heiliráðfrøði | | | 2,0 | 2,0 | | | 1,0 | | | 1,5 | | 0,5 | 0,5 | | | | 7,5 |
| Arbeiðsskipanarlæra | | | 1.0 | | | | | | | | | | | | | | 1,0 |
| Føðslulæra/-frøði | | | | 2,0 | | | | | | 0,5 | | | | | | | 2,5 |
| Vísindaástøði/gransking | | 2,0 | | | | 3,0 | | 2,0 | | 0,5 | 2,5 | | | | 2,0 | 3,0 | 15,0 |
| Anatomi / lívvirkisfrøði | 9,5 | | | | | | | | | | | | | | | | 9,5 |
| Arvafrøði | | 1,5 | | | | | | | | | | | | | | | 1,5 |
| Smáverulívfrøði | | | 2,0 | | | | | | | 0,5 | | | 0,5 | | | | 3,0 |
| Lívevnafrøði | 3,0 | | | | | | | | | | | | | | | | 3,0 |
| Kunningarfrøði | | | 0,5 | | | | | | | | 0,5 | | 0,5 | | 0,5 | 1,0 | 3,0 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| *Hugvísindalig fak* | | | | | | | | | | | | | | | | | **20** |
| Heimspeki/siðfrøði | | 0,5 | 0,5 | | | 0,5 | 0,5 | | 0,5 | | 1,0 | | | | | 0,5 | 4,0 |
| Átrúnaður | | | | | | | | | | 1,0 | 0,5 | | | | | | 1,5 |
| Samskifti | | | 1,0 | | | 0,5 | 0,5 | | 1,0 | 0,5 | | 0,5 | | | | | 4,0 |
| Sálarfrøði | | | | | | 2,0 | 1,0 | | | 1,0 | 0,5 | 0,5 | | | | | 5,0 |
| Námsfrøði | 0,5 | | 0,5 | | | 1,0 | | | 1,5 | 0,5 | 0,5 | | | | | 1,0 | 5,5 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| *Samfelagsvísindalig fak* | | | | | | | | | | | | | | | | | **15** |
| Skipanarfrøði/leiðsla | | | | | | | 1.0 | | | | 1,0 | | 3,0 | | | | 5,0 |
| Løgfrøði | | | 0,5 | | | | 0,5 | | 0,5 | | | 0,5 | | | | | 2,0 |
| Samfelagsfrøði/mannfrøði | | 1,0 | | | | 1,5 | 0,5 | | 2.0 | 1,5 | 0,5 | | | | | 1,0 | 8,0 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| *ECTS tilsamans* | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **15** | **10** | **20** | **240** |

## 13.0 Yvirlit yvir próvtøkur

| *Eind* | *Innan-hýsis - ástøði* | *Innan-hýsis - klinisk* | *Uttan-hýsis - ástøði* | *ECTS* | *Próvtøkuháttur* | *Meting* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | X | 12,5 ECTS | Skrivlig próvtøka | Próvtal |
| 2 | X | | | 15 ECTS | Skrivlig próvtøka | Próvtal |
| 3 | X | | | 15 ECTS | Skrivlig og munnlig próvtøka | Próvtal |
| 4 | | | X | 15 ECTS | Skrivlig próvtøka | Próvtal |
| 5 | | X | | 15 ECTS | Støðumet | Meting í mun til læruúrtøku.<br><br>Staðið/ikki staðið. |
| 6 | | | X | 15 ECTS | Skrivlig próvtøka | Próvtal |
| 7 | | | X | 7 ECTS | Skrivlig og munnlig próvtøka | Próvtal |
| 7 | | X | | 8 ECTS | Støðumet | Meting í mun til læruúrtøku.<br><br>Staðið/ikki staðið |
| 8 | | X | | 12 ECTS | Støðumet | Meting í mun til læruúrtøku.<br>Staðið/ikki staðið. |
| 8 | X | | | 3 ECTS | Skrivlig próvtøka | Staðið/ikki staðið |
| 9 | X | | | 15 ECTS | Skrivlig próvtøka | Staðið/ikki staðið |
| 10 | X | | | 15 ECTS | Skrivlig próvtøka | Próvtal |
| 11 | | | X | 15 ECTS | Skrivlig próvtøka | Próvtal |
| 12 | | X | | 15 ECTS | Støðumet | Meting i mun til læruúrtøku.<br>Staðið/ikki staðið. |

| *Eind* | *Innan-hýsis - ástøði* | *Innan-hýsis - klinisk* | *Uttan-hýsis - ástøði* | *ECTS* | *Próvtøkuháttur* | *Meting* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 13 | X | | | 0,5 ECTS | Skrivlig próvtøka[5] Heilivágsrokning | Staðið/ikki staðið. |
| 13 | | X | | 14,5 ECTS | Støðumet | Meting i mun til læruúrtøku. Staðið/ikki staðið |
| 14 | | X | | 15 ECTS | Støðumet | Meting i mun til læruúrtøku. Staðið/ikki staðið. |
| 15 | X | | | 10 ECTS | Kravdur lestraraktivitetur relateraður til bach. ritgerð | Staðið/ikki staðið |
| 16 | | | X | 20 ECTS | Bachelorritgerð | Próvtal |

Fak, innihald og metingarstøði fyri próvtøkurnar eru lýst fyri hvørja próvtøku sær. Treytin fyri at sleppa til próvtøku á einstøku eindunum er, at lesandi hava tikið lut í øllum kravdum lestrarvirkni og próvtøkum, sum eru áðrenn ávísu próvtøkuna.

[5] Sertreytir við próvtøku innan heilivágsrokning. Sí 14.1 Almennar reglur fyri próvtøkur.

**14.0 Próvdøming**
Í útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing eru innanhýsis og uttanhýsis próvtøkur.
Innanhýsis próvtøkur verða mettar av undirvísara, sum er próvhoyrari, ella av próvhoyrara og innanhýsis próvdómara.
Uttanhýsis próvtøkur verða mettar av próvhoyrara og próvdómara, sum er tilnevndur av Mentamálaráðnum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum.

Próvtøkurnar verða mettar eftir galdandi próvtalsstiga, sjá galdandi kunngerð um próvtalsstiga og aðra próvdøming á heimasíðuni www.logir.fo

Próvtøkurnar eru á føroyskum. Lesandi skal stava og orða seg í mun til føroyskar rættskrivingarreglur og nýta røtt frøðiheiti. Førleikin at stavseta og málbera seg verður bert mettur í bachlorritgerðini, tó soleiðis at fakliga innihaldið vigar mest.
Dekanurin kann annars, har viðurskiftini gera tað møguligt, loyva lesandi, sum ynskir tað, at fara til próvtøku á einum fremmandamáli.

Próvtøkurnar kunnu skipast sum einsæris- ella bólkapróvtøkur.
Í bólkapróvtøkuni verður tryggjað, at hvør lesandi verður dømdur sær. Í útbúgvingini kunnu ávísar próvtøkur verða lagdar til rættis sum bólkapróvtøkur, har fleiri lesandi verða próvdømd fyri felags avrik. Avrikini skulu tó eyðmerkjast og próvdømast hvørt sær. Tilskilast skal hvønn ella hvørjar partar tann einstaki lesandi hevur ábyrgd av, og hvør ella hvørjir partar eru felags. Hvør einstakur partur skal kunna dømast sær. Býtið av ábyrgdarpørtum er soleiðis: Talið av lesandi + felagspartur, t.d. 4 lesandi + felagspartur = 5 partar. Felagsparturin skal umfata inngang, niðurstøðu og perspektivering. Samandráttur er ikki íroknaður.

Krøv eru til hvørja próvtøku sær.

Innskrivingin til allar innanhýsis og uttanhýsis próvtøkur er sjálvvirkin. Frámelding til próvtøkur og innlating av uppgávum skulu fylgja innanhýsis reglum. Lesandi, sum ikki fer til próvtøku vegna sjúku, skal boða Sjúkrarøktarfrøðideildini frá á sjálvum próvtøkudegnum og skjalfesta sjúkrameldingina við læknaváttan innan eina viku frá próvtøkudegnum.

Uppgávur, sum ikki eru latnar inn rættstundis, verða mettar *ikki staðið.*

**Kliniskar próvtøkur**
Próvtøkurnar í klinisku undirvísingini eru innanhýsis og verða mettar staðið/ikki staðið. Tær klinisku próvtøkurnar eru einsæris próvtøkur. At enda í hvørjum kliniskum tíðarskeiði metir kliniski vegleiðarin lesandi í mun til læruúrtøkuna fyri kliniska undirvísingingarskeiðið – støðumet.

Í kliniska útbúgvingarpartinum skulu 60 ECTS metast við próvtøku.

**14.1 Almennar reglur fyri próvtøku**
Fyri at kunna halda fram í útbúgvingini, skal lesandi við endan av 4. eind fara upp til tær próvtøkur, sum eru ásettar í námsskipanini í eindunum 1- 4.
Lesandi skal hava staðið próvtøkurnar, sum eru áðrenn 8. eind, fyri at kunna halda fram við útbúgvingini.
Lesandi skal hava luttikið í øllum kravdum lestrarvirkni, uppgávum og próvtøkum, sum liggja frammanundan uttanhýsis próvtøku, áðrenn próvtøkan kann avgreiðast.
Lesandi skal hava staðið tær innanhýsis og uttanhýsis próvtøkur, sum eru í 3 teimum fyrstu lestrarárunum, áðrenn farið verður undir bachelorritgerðararbeiðið.

Lesandi kann í mesta lagi fara upp tríggjar (3) ferðir til somu próvtøku ella aðra døming. Dekanurin kann loyva einum lesandi fara upp eina fjórðu (4) ferð um serlig viðurskifti gera seg galdandi. Spurningurin um vantandi lestrarførleika kemur ikki inn undir serlig viðurskifti.

Bachelorritgerð er vanliga einstaklingsavrik, men kann eftir reglum, sum dekanurin ásetur, avrikast av fleiri lesandi í felag. Avrikini skulu eyðmerkjast og próvdømast hvørt sær. Bachelorritgerðin skal verða mett staðin av vegleiðara, áðrenn munnligu próvhoyringina ella framløguna av ritgerðini. Eitt samlað próvtal verður givið fyri skrivliga arbeiðið og próvhoyringina ella framløguna.

Dekanurin á Megindeildini fyri náttúru- og heilsuvísindi kann gera undantøk frá tíðarfreistini til luttøku í hvørji einstakari próvtøku um serlig viðurskifti gera seg galdandi.
Kunngerð nr. 19 frá 3. mars 2011 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum (B.Sc.Cur), Kap 6, §14-32

14.1.1 Undantak og sertreyt
Undantak er frá almennu regluni "lesandi kann í mesta lagi fara upp 3 ferðir til somu próvtøku" í próvtøkuni í heilivágsrokning. Sertreytin er, at próvtøkan skal svarast 100 % rætt. Sí krøv til próvtøku í heilivágsrokning.

**14.2 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka**
Um lesandi ikki stendur eina próvtøku, kann hann fara til endurpróvtøku í fylgjandi lestrarhálvu, ella tá ið Sjúkrarøktarfrøðideildin ásetur tíðina. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri endurpróvtøkuna.
Sjúkrarøktarfrøðideildin ásetur tíðina fyri sjúkrapróvtøku. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri sjúkrapróvtøkuna. Læknaváttan er kravd til sjúkrapróvtøku.

**14.3 Kæruviðurskifti**
Kærur um próvtøkur, próvtøkuhættir, próvdøming, próvskjal ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni, undantikið døming av kliniskari praksis, verða stílaðar til dekanin og latnar skrivstovuni á Sjúkrarøktarfrøðideildini. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd.
Kunngerð nr. 19 frá 3. mars 2011 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum (B.Sc.Cur), Kap 6, § 36 - 39

**15.0 Góðskriving**

Sjúkrarøktarfrøðideildin ger av, eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, hvørja eind lesandi úr øðrum sjúkrarøktarfrøðiskúla skal í.
Sjúkrarøktarfrøðideildin kann í hvørjum einstøkum føri gera av, at útbúgvingarpartar, sum lesandi hevur staðið eftir ásettum reglum fyri eina aðra framhaldsútbúgving, heilt ella lutvíst kunnu koma í staðin fyri samsvarandi útbúgvingarpartar. Avgerðin verður tikin við støði í einari fakligari meting av javnvirðinum millum viðkomandi útbúgvingarpartar.

**16.0 Luttøka í klinisku undirvísingini**

Lesandi hevur skyldu at taka lut í klinisku undirvísingini. Um lesandi hevur meira enn 20% fráveru av undirvísingini verður avtala gjørd millum kliniska útbúgvingarstaðið, Sjúkrarøktarfrøðideildina og lesandi um leinging av kliniska tíðarskeiðinum svarandi til kravdu luttøkuna. Sjúkrarøktarfrøðideildin kann gera undantak frá reglunum um so er, at serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Lesandi ger í samstarvi við kliniska útbúgvingarstaðið eina persónliga kliniska lestrarætlan fyri tíðarskeiðið. Kliniska lestrarætlanin er ein ítøkiliggerð av lestrargongdini, so lesandi mennir virkisførleika sín og røkkur læruúrtøkuna fyri kliniska tíðarskeiðið.

**17.0 Góðkenning av kliniskum útbúgvingarstøðum**

Sjúkrarøktarfrøðideildin og kliniska útbúgvingarstaðið samstarva við tí fyri eyga, at samanhangur er millum ástøðiligu og klinisku undirvísingina og fyri at tryggja, at lesandi ognar sær kliniskar førleikar.
Kliniska undirvísingin fer fram á góðkendum kliniskum undirvísingarstøðum, sum verður løgd til rættis við støði í møguleikunum á staðnum. Tað er álagt kliniska undirvísingarstaðnum at gera eina lýsing av klinisku undirvísingarætlanini, sum er í tráð við námsskipanina. Sjúkrarøktarfrøðideildin skal góðkenna lýsingina annaðhvørt ár.

Kliniskir undirvísarar hava ábyrgd av at leggja fakligu og námsfrøðiligu ætlanina til rættis, og skulu tryggja, at útbúgvingin er grundað á yrki og yrkisroyndir, og at kliniska undirvísingin verður løgd til rættis við samanhangi millum ástøðiligan og kliniskan kunnleika

Fyri at góðkenna eitt kliniskt undirvísingarstað krevst, at staðið:

- lýsir hvørjar sjúkrarøktarfakligar uppgávur og spurdómar, tey arbeiða við
- lýsir hvørjar formligar førleikar starvsfólkið hevur, starvsfólkasamanseting og starvsfólkatal
- støðugt eftirmetir klinisku undirvísingina fyri at dygdarmenna hana
- ger eina lesiætlan, sum verður samskipað við skúlan
- formligt setur tíð av til klinisku undirvísingina

Um so er, at  lesandi ikki fylgja ásettu lestrargongdini, skal kliniski vegleiðarin kunna leiðsluna á Sjúkrarøktarfrøðideildini. Leiðslan tekur síðani avgerð um, hvørji stig skulu takast.

### 18.0 Faklýsingar

Staðseting av fakum í útbúgvingini síggjast í talvuni *12.0 Yvirlit yvir býtið av ECTS* á s. 8. Pensum er 150 síður fyri hvørji 1,5 ECTS í ástøðiliga partinum og 50 síður fyri hvørji 1,5 ECTS í kliniska partinum av útbúgvingini – í alt 18.000 síður. Atlit verður tikið at torleikanum í ástøðinum.
Neyvari faklýsing og pensum er lýst í eindarlýsingunum.

### 18.1 Sjúkrarøktarfakliga grundarlagið

Útbúgvingin er granskingargrundað, og fakliga innihaldið í útbúgvingini verður grundað á kunnskap frá sjúkrarøktarfakinum í samanhangi við heilsu-, náttúru-, samfelags- og hugvísindalig fak. Útbúgvingin verður løgd til rættis við støði í einari grundleggjandi vísindaástøðiligari fatan, sum gevur førleika at kanna ástøði, hugtøk og háttaløg frá sjúkrarøktarfakinum og øðrum fakum, sum skulu brúkast til at lýsa, greiða frá, greina og meta um tey serligu vandamál, fyribrigdi og samanhang, sum sjúkrarøktarfrøðingar arbeiða við og í.

### 18.2 Sjúkrarøktarfakið – 140 ECTS

Sjúkrarøktarfakið fevnir um ástøðiliga (50 ECTS) og kliniska undirvísing (90 ECTS). Dentur verður lagdur á virksemi, vísindaástøðiliga fatan og siðfrøðiligar spurningar, sum hoyra til fakið. Í undirvísingini verða viðgjørd ástøði í og um sjúkrarøkt, hugtøk og háttaløg og útvald vísindalig ástøði, harumframt hugtøk og háttaløg frá øðrum fakum, sum kunnu vera við til at lýsa, greiða frá og skilja tey serligu vandamál, fyribrigdi og samanhangir, sum sjúkrarøktarfrøðingar arbeiða við og í.
Málini eru neyvt lýst í mun til læruúrtøku í eindarlýsingunum.

Málið er

- at lesandi ognar sær vitan um og skil fyri ástøði, hugtøkum og meginreglum í sjúkrarøkt, íroknað menningina av sjúkrarøktarfakinum, siðfrøði og vísindaástøðiligum tilgongdum
- at lesandi ognar sær vitan um og skil fyri ástøðiliga, metodiska og kliniska kunnleikan at útinna, leiða, miðla og menna sjúkrarøkt, sum er heilsufremjandi, heilsuvarðveitandi og fyribyrgjandi eins væl og viðgerandi, endurmennandi og linnandi
- at lesandi mennir fatanina av virðum, fatanum og atburði hjá menniskjum í sambandi við heilsu, sjúku og sjúkrarøkt, sum grundarlag undir dygdargóðari umsorgan, har fatanin hjá sjúklinginum av síni egnu støðu og sjúkrarøktarfaklig meting eru miðdepilin
- at lesandi mennir evnini at greina empiri við nýtslu av ástøði og harumframt menna evnini til kritiska refleksjón og at taka sjálvstøðugar sjúkrarøktarfakligar avgerðir og fremja tær

- at lesandi mennir sín fakliga samleika og sín førleika at samskifta. Hetta skal vera grundarlag undir samstarvi við sjúklingar, avvarðandi, starvsfelagar og aðrar yrkisbólkar í heilsuverkinum

**18.3 Lýsing av klinisku undirvísingini**
Endamálið við klinisku undirvísingini er, at lesandi, við venjing av grundleggjandi førleikum, hevur ábyrgd av at ogna sær fakligt hegni og venur evnini at meta um, taka vælgrundaðar avgerðir og útinna dygdargóða sjúkrarøkt við støði í nýggjastu vitanini. Lesandi skjalfestir, eftirmetir, miðlar og útinnar kliniska sjúkrarøkt á vísindaligum grundarlagi og í samsvari við tjóða og altjóða krøv.

Fyri at tryggja, at útbúgvingin er grundað á yrki og yrkisroyndir, verður kliniska undirvísingin løgd til rættis við samanhangi millum ástøðiligan og kliniskan kunnleika. Kliniski parturin av útbúgvingini er lagdur til rættis við støði í galdandi lóg og kunngerðum fyri útbúgvingina og við atliti at galdandi krøvum í Evropeiska samveldinum (EU-Directive 2005/36/EC of 7. September 2005) viðvíkjandi klinisku økjunum í útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing.

Málið er:

- at lesandi ognar sær førleika at útinna, miðla, menna og leiða sjúkrarøkt í kliniskari praksis
- at lesandi mennir førleika at grunda arbeiðið á vitan og at arbeiða miðvíst greinandi í mun til kliniska praksis
- at lesandi mennir førleika at meta um tørv fyri sjúkrarøkt, taka haldgóðar avgerðir í mun til tørvin og at eftirmeta sjúkrarøkt
- at lesandi mennir førleika at virka fakliga, løgfrøðiliga og etiskt ábyrgdarfult og at eftirmeta sjúkrarøkt
- at lesandi mennir førleika at samstarva við sjúkling, avvarðandi, samstarvsfelagar og aðrar yrkisbólkar við atliti at etniskum, mentanarligum, átrúnaðarligum og málsligum grundarlag

**18.4 Sjúkrarøktarfakliga heilsuvísindaliga og náttúruvísindaliga grundarlagið - 65 ECTS**
Kunnleikin innan heilsuvísindaligu fakini hevur týdning fyri at meta um heilsustøðu, sjúkueyðkenni og viðgerðarúrslit hjá sjúklingum og íbúgvarum landsins og fyri at seta sjúkrarøkt í verk.

Málið við heilsuvísindaligu fakunum er, at lesandi mennir ástøðiligan og praktiskan kunnleika í mun til heilsuvísindaligt ástøði, hugtøk, meginreglur og háttaløg, sum eru neyðug fyri heilsufremjandi, heilsuvarðveitandi, fyribyrgjandi, viðgerandi, endurmennandi og linnandi sjúkrarøkt.

Harafturat fær lesandi grundarlag fyri at staðfesta og greina ymiskar vísindaástøðiligar støður, háttaløg og úrslit fyri at hava eina kritiska støðu til viðkomandi granskingar- og menningararbeiði og fyri at vera førur fyri at nýta tey.

Málið við náttúruvísindaligu fakunum er, at lesandi skilja, hvussu mannveran er bygd, hvussu hon virkar, sjúkustøður og tilgongdir, útlit viðvíkjandi sjúku og læknaligar viðgerðir. Harafturat skal lesandi skilja grundarlagið fyri náttúruvísindaligum ástøði, sum verður brúkt til at lýsa, greiða frá og meta um, hvussu mannakroppurin virkar.

**Fak:**

| | |
|---|---|
| Sjúkulæra | 13,0 ECTS |
| Farsóttarfrøði og umhvørvislæknafrøði | 1,5 ECTS |
| Fólkaheilsuvísindi | 4,5 ECTS |
| Heiliráðfrøði | 7,5 ECTS |
| Arbeiðsskipanarlæra | 1,0 ECTS |
| Føðslulæra/ -frøði | 2,5 ECTS |
| Vísindaástøði og gransking | 15,0 ECTS |
| Anatomi, lívvirkisfrøði | 9,5 ECTS |
| Lívevnafrøði | 3,0 ECTS |
| Arvafrøði | 1,5 ECTS |
| Smáverulívfrøði | 3,0 ECTS |
| Kunningarfrøði | 3,0 ECTS |

**18.5 Sjúkrarøktarfakliga og hugvísindaliga grundarlagið - 20 ECTS**

Málið við hugvísindaligu fakunum er, at lesandi skilur týdningin av kenslulívi, sannkenning og virki hjá menniskjanum, fyri medmenniskjaligt og millummenniskjaligt samskifti, samvirki og fyri at miðla vitan. Hetta fyri at vera førur fyri at útinna sjúkrarøkt út frá støðu sjúklingsins.

Málið við hugvísindaligu fakunum er, at lesandi mennir ástøðiligan og praktiskan kunnleika og førleika í mun til hugvísindaligt ástøði, hugtøk, meginreglur og háttaløg. Hesi eru neyðug fyri at menna førleika í etiskari refleksjón, interaktión og samskifti og til at meta um tørv fyri kunning, vegleiðing og undirvísing til sjúklingar, avvarðandi, heilsustarvsfólki og onnur í sosiala netverkinum.

Harafturat fær lesandi grundarlag fyri at staðfesta og greina ymiskar vísindaástøðiligar støður, háttaløg og úrslit fyri at hava eina kritiska støðu til viðkomandi granskingar- og menningararbeiði og fyri at vera førur fyri at nýta tey.

**Fak:**

| | |
|---|---|
| Heimspeki og siðfrøði | 4,0 ECTS |
| Átrúnaður | 1,5 ECTS |
| Samskifti | 4,0 ECTS |
| Sálarfrøði | 5,0 ECTS |

| | |
|---|---|
| Námsfrøði | 5,5 ECTS |

**18.6 Sjúkrarøktarfakliga og samfelagsvísindaliga grundarlagið – 15 ECTS**

Málið við samfelagsvísindaligu fakunum er, at lesandi skilja, hvussu menniskja mennist og lærir, og hvussu tey bera seg at sínámillum í ymiskum samfeløgum og mentanum. At lesandi skilja, hvussu samfelagslig og mentanarlig viðurskifti ávirka virkismøguleikar. At lesandi skilja týdningin av, at sjúkrarøkt verður útint í einum sosialum, mentanarligum og samfelagsligum høpi.

Málið við samfelagsvísindaligu fakunum er, at lesandi fær vitan um, hvussu almanna- og heilsuøkið er skipað, virkar og mennist, relevant lógar- og regluverk. At lesandi mennir ástøðiligan og praktiskan kunnleika og førleika í mun til samfelagsvísindaligt ástøði, hugtøk, meginreglur og háttaløg. Hesi eru neyðug fyri at menna førleika í refleksjón og útinna sjúkrarøkt í einum tvørfakligum, sosialum, mentanarligum og samfelagsligum høpi.

Harafturat fær lesandi grundarlag fyri at staðfesta og greina ymiskar vísindaástøðiligar støður, háttaløg og úrslit fyri at hava eina kritiska støðu til viðkomandi granskingar- og menningararbeiði og fyri at vera førur fyri at nýta tey.

**Fak:**

| | |
|---|---|
| Samfelagsfrøði og mannfrøði | 8,0 ECTS |
| Skipanarfrøði og leiðsla | 5,0 ECTS |
| Løgfrøði | 2,0 ECTS |